ítróttur

Trelleborg vann 1-0 á Blackburn

Svenska liðið, ið GÍ tepurt mátti lúta fyri í fyrsta umfarinum í UEFA Cup-kappingini, tók øll á móti týskvøldið við at vinna 1-0 á enska Blackburn. Og skotska mótstøðuliðið hjá HB, Motherwell, tapti óvæntað »bert« 1-0 móti týska Borussia Dortmund



Trelleborg FF – mótstøðuliðið hjá GÍ – vann óvænatað týskvøldið á Blackburn
Mynd: Hilmar Jan

Vóru vit føroyingar positivt bilsnir av gøtumonnum, at teir bert heilt tepurt taptu seinna dystin móti svenska liðnum Trelleborg FF í innleiðandi umfarinum í UEFA Cup-kappingini – samanlagt var talan um eitt 4-2 tap – eru sviar ikki minni positivt bilsnir og eisini beinleiðis ernir av víðari avrikinum hjá suðursvenska liðnum, ið týskvøldið tók øll á bóli og vann á felagnum hjá fyrrverandi bretska stórspælaranum Kenny Dalglish, Blackburn Rovers.

Sviarnir vóru snøgt sagt um ein háls at kalla allan dystin, meðan stórspælarar sum Allan Shearer – skoraði í farnu viku bæði málini hjá Onglandi móti USA – og Chris Sutton kappaðust um at brenna heilt upplagdar málmøguleikar.

Tað var stórt sæð bert einum av spælarunum hjá sviunum fyri at takka, at teir ikki fóru avstað aftur við stórtapi – nevniliga polska málverjanum Ryszard Jankowski, ið stóð ein avbera góðan dyst í málinum hjá Trelleborg. Hann var alla tíðina á rætta stað til rætta tíð, og ferð eftir ferð sýndi hann klassa, tá hann onkursvegna fekk tileinkisgjørt tær mongu og næsku royndirnar hjá Blackburn.

Sviarnir skoraðu móti endanum

Tað restaðu bert 19 minuttir, tá sviar fingu sín stóra kjans. Verjan hjá Blackburn var illa skipað í einari einstakari støðu, og tað var nóg mikið til, at Fredrik Sandell kundi slíta seg leysan og fara púrasta einsamallur inn í brotsteigin og skjóta bóltin fram við Tim Flowers í málinum hjá Blackburn. Bóltin fór um handaru stong í málið til 1-0, og sjálvsagt kundu sviarnir ikki fjala ta ovurstóru frøi, at teir heilt og púrasta óvæntað kundu sleppa av vøllinum við sigri – enntá uttan tveir av grundstuðlunum á liðnum, ið sóu reytt móti GÍ.

Samstundis vísti sjónvarpsskermurin ein bleikan og fáorðaðan Dalglish, ið avgjørt ikki hevði væntað, at hansara menn, ið høvdu havt álop oman á álop, soleiðis skuldu verða søkt av hesum eina kjansinum, ið Trelleborg fekk.

Nú er ikki óvist, at mótstøðuliðið hjá GÍ enntá fer at sleppa víðari í kappingini, tí Blackburn hevur mist ein fyrimun, við tað at sviunum eydnaðist at skora á útivølli – tey málini telja tvífalt í UEFA Cup og hinum europeisku kappingunum.

Motherwell fekk eisini »gott« úrslit

Tað er eingin loyna, at skotskur fótbóltur stendur í skugganum av fyrst og fremst enskum fótbólti, men eisini fótbóltinum aðrastaðni í Europa.

Tí kom tað eisini dátt við hjá mongum, at Motherwell bert tapti 1-0 móti Borussia Dortmund á útivølli. Motherwell var mótstøðuliðið hjá HB í UEFA Cup-kappingini.

Væntandi var, at týska liðið fór at koma á vøllin við vindmegi 25 móti skotunum, og at heimadysturin skuldi tryggja týskarunum tað, ið neyðugt var, fyri at fáa víðari luttøku. Men nú er einki avgjørt, tí á heimavølli ber Motherwell orð fyri at kunna sýna stóra styrki – og meira býr í skotunum, enn teir vístu, tá teir beindu fyri HB í UEFA Cup-kappingini.

Onnur úrslit

Umframt liðini, vit kenna frá føroysku UEFA Cup-dystunum, vóru eisini onnur merkisverd úrslit í hesi kapping týskvøldið, tá hugt verður at, hvussu grannar okkara kláraðu seg.

Norska liðið Rosenborg úr Tróndheimi fekk eitt sera gott úrslit týskvøldið, tá tað á heimavølli eydnaðist at vinna 1-0 á spanska liðnum Deportivo la Coruna, ið telist millum frægastu liðini í Spania. At norðmenninir í besta føri kundu klára javnleik á heimavølli, høvdu fleiri kanska væntað og vónað, men at Rosenborg skuldi vinna á spaniólunum, er eitt rættiliga óvæntað úrslit.

Tvey donsk lið vóru eisini í UEFA Cup-dysti týskvøldið. OB, ið átti at verið betri enn norðurírska Linfield, fekk bert javnleik 1-1 á útivølli, men hevur so sjálvsagt fyrimun av útivallarmálinum og kann helst klára seg betur á heimavølli um fjúrtan dagar.

FC Keypmannahavn, ið vann DM í 1993 og gjørdist nummar tvey í 1994, er í løtuni botnproppur í donsku superliguni. Í farnu viku varð venjarin Keld Kristensen avloystur av fyrrverandi venjaranum, Benny Johansen, og undir leiðslu av honum fekk FC Keypmannahavn ikki so galið úrslit móti Slovan Bratislava. Danirnir taptu 1-0, men tað var tó eitt nógv frægari úrslit, enn væntast kundi frammanundan.

Grannar okkara í Íslandi kunnu viðhvørt syrgja fyri onkrum óvæntaðum úrsliti – eisini, tá íslendsk feløg eru úti í Europa og royna seg. Men ikki bar til hjá ÍA av Akranesi, ið á heimavølli mátti lúta fyri týska liðnum Kaiserslautern. Talan var um so mikið stórt tap, at ÍA ikki hevur møguleika at bøta stórvegis um tað á útivølli – Kaiserslautern vann dystin 4-0.

hj.



Motherwell, ið HB spældi ímóti, tapti við einum máli móti Borussia Dortmund
Mynd: Hilmar Jan

FM-kappingar í yngru deildunum leygardagin

Við kappingum í Havn, Gøtu, Klaksvík og Sandavági skulu FM-vinnarar finnast í smápiltadeildini, gentum 10-12 ár og pinkum, meðan FM-heitið í smágentudeildini verður endaliga avgreitt 24. september

Landskappingin í fótbólti nærkast endanum í teimum ymsu deildunum, og um vikuskiftið skulu føroyameistarnir finnast í fleiri av teimum yngru deildunum.

Leygardagin verða tey endaligu umførini í smápiltadeildini, smágentudeildini, gentum 10-12 ár og pinkum.

Í Havn skulu B68, ÍF, Streymur og HB kappast um FM-heitið í smápiltadeildini, meðan hini feløgini, ið ikki komu í FM-bólkin, skulu kappast í Leirvík. Tey liðini eru LÍFa, NSÍa, HBa, TBa, GÍb, Skála b, HBe, KÍe, NSÍc og vinnarin av miðøki 3.

Kappingin um føroyameistarahe'tið hjá gentum 10-12 ár verður í Klaksvík, og har kappast NSÍ, HB, Skála og KÍ, meðan hini liðini, ið ikki komu við í FM-bólkn, kappast á Toftum. Tey eru KÍa, GÍb, AB, B71, NSÍa og NSÍ.

Pinkurnar skulu finna sín føroyameistara í kapping í Sandavági, og har eru tað AB, ÍF, B36 og SÍF, ið dystast um FM-heitið.

Í Gøtu verður fyrra umfarið í kappingini um føroyameistaraheitið í smágentudeildini millum B36, KÍ, NSÍ og GÍ. Har verður endaliga umfarið spælt í Runavík leygardagin 24. september. Hini liðini, ið ikki eru í FM-bólkinum, kappast á Sandi nú leygardagin. Tey eru B71, B36b, AB, Skála b og EBb.

hj.

Jógvan og Zacharias vunnu

Av tí, at vit hava fingið skeivar upplýsingar um tenniskappingina, ið her í blaðnum varð umrødd í gjár, skal her koma ein rætting til úrslitið í finaluni í tvímansleiki hjá monnum. Hana vunnu Jógvan Poulsen og Zacharias Bech 2-1 á Martini Heinesen og Krisjani Christiansen. Martin Simonsen og Jákup Sverri Kass, ið stóðu at vinna, vóru als ikki í finaluni – teir taptu aðra av semi-finalunum. Vit biðja lesarar og spælarar halda okkum til góðar, men vit høvdu fingið skeiva upplýsing um úrslitið.